# Sikken en fest

**Johnny Reimar setti eitt festligt punktum fyri G! 2009, tá hann beyð áhoyrarunum í veitslu á Spælipássinum**



Sveinur Dam
sveinur.dam@gmail.com

Mong settu spurnartekin við avgerðina hjá G! leiðsluni, at fáa Johnny Reimar hendanvegin, tí hann passar ikki rættiliga inn í konseptið G! Men havandi í huga, at hann nokk ikki var leigaður fyri at geva fólki eina stóra tónlistarliga uppliving, men heldur fyri at hjálpa veitsluhýrinum í gongd, var avgerðin slett ikki so galin.

## Royndur undirhaldari

Johnny Reimar hevði longu verið í gongd í heilt nógv ár, tá teir flestu gestirnir á Spælipássinum blivu føddir, so tað var ein royndur undirhaldari, ið fór á pallin klokkan 01.00 leygarnáttina. Og hóast løgini í stóran mun eru einkisigandi og lættisoppakendur umpa-umpa tónleikur ljóðaði, so gjørdi hann júst tað, ið hann dugir best: Hann fekk øll í veitsluhýr, tá hann spældi smølfasangir og aðrar slagarar fyri vælhýrdu G! gestunum, ið hoppaðu, dansaðu og annars bara vóru í hopla.

## Kitsjut framførsla

Framførslan annars líktist onkrum, ið tú einans sært á TV2 Charlie. Við reyðum klædningsjakka, svartari skjúrtu og gráum hári og – yvirskeggi, livdi Johnny Reimar upp til vónina um ein ektaðan Dansktop gubba. Orkestrið var ílætið laksafarvaðar jakkar, og hóast hesir vóru beinleiðis ljótir, so góvu teir framførsluni rætta dámin av danskari bygdaligheit. Sera kitsjut.



**Við reyðum klædningsjakka, svartari skjúrtu og gráum hári og – yvirskeggi, livdi Johnny Reimar upp til vónina um ein ektaðan Dansktop gubba**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Veitslurómur á spælipássinum

At fólk vóru komin saman, bert fyri at hava tað stuttligt, var týðuligt, og Johnny Reimar dugdi væl at fáa fjøldina við. Stuttligt gjørdist tað, tá hann hálaði tvær ungar gentur upp á pallin, gav teimum smølfamaskur á, og so skuldu tær standa og dansa, meðan smølfasangurin bleiv spældur. Vorðið sum undirhald! At enda við spældi hann tað stóra hittið Sikken en Fest, og ikki kann sigast annað, enn at lagið undirstrikaði framførsluna væl. Tí hóast framførslan ikki hevði tað stóra uppá seg, reint tónleikaliga, so var tað ein øgiligur veitslurómur á Spælipássinum hesa náttina.

# Teitur var feitur

**Teitur syrgdi fyri eini hugnaligari løtu leygarkvøldið, tá hann, saman við nýggja bólki sínum og limum úr Havnar Hornorkestri, framførdi á Gøtusandi.**



Sveinur Dam
sveinur.dam@gmail.com

Teitur Lassen er ein av fólkakærastu tónleikarunum her heima, og við vælkendum løgum sum Josephine, Havnin er ein lítil bygd og I was just thinking, var grundin løgd fyri einari hugnaligari løtu á Sandinum.

Í byrjanini var einki. So kom hornblástur, tá fólkini úr Havnar Hornorkestri, ið Teitur hevði fingið við sær til høvi, spældu eina rímiliga langa intro. Síðan var pallurin klárur til Teit, ið byrjaði við at spæla lagið We still drink the same water. Tað gjørdist beinanvegin klárt, at Teitur var í toppformi, og saman við nýggja bólkinum hjá sær, helt hann fram við eini røð av kendum løgum, ið fingu allan Sandin at vagga.

Millum sangirnar gav Teitur sær eisini stundir at skemta, tá hann millum annað viðmerkti, at orsøkin til at fólk ikki sungu harðari við, mátti vera, at tey spara røddina til Frændur, ið skuldu skipa fyri sangløtu aftaná Teitur. Hetta fall í góða jørð hjá áhoyrarunum, ið beinanvegin tóku seg saman, og sungu betur við, tað sum eftir var av framførsluni.



**Teitur hevði ein nýggjan bólk við sær á pallin, og sigast má, at hesin bólkurin riggar sera væl**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Havnin er ein lítil bygd

Teitur spældi eina rímiliga breiða viftu av løgum, frá friðarligu Josephine og I was just thinking til meira lívligu Louis Louis og Katherine the Waitress. Sandurin var væl við í sangunum, alla framførsluna, og tá hann proklameraði, at Havnin er ein lítil bygd, var løtan so hugnalig og gleðismikil, sum hon kann vera. Sjarmerandi maðurin á pallinum hevði enn einaferð víst, at hann dugir betur enn tey flestu at skapa ein stemning, ið gevur tær eina lætta kenslu av vælveru, tá framførslan er liðug.

## Góður bólkur

Teitur hevði ein nýggjan bólk við sær á pallin, og sigast má, at hesin bólkurin riggar sera væl. Serliga trummuleikarin var framúr góður, og hóast hann ikki spældi nakað spektakulert, livdi hann seg væl inn í tónleikin, og hvørt slag gav meining. Frískligt, men tað má eisini sigast um framførsluna sum heild, at hon var eitt frískligt lot í góðveðrinum leygarkvøldið. Hugnaligasta konsertin, eg havi verið til á G! hígartil.